

# Ætla ikki at minka um oljuframleiðsluna

Jógvan Hugo Gardar

01.08.2015 - 13:47

Oljan.fo

OPEC-londini hava ongar ætlanir um at minka um oljuframleiðsluna, sigur OPEC-leiðarin Abdullah El-Badri, sambært offshore.no.

OPEC kemur at halda fram við at framleiða olju í tí mongdini sum limalondini gera í dag, sigur hann, og leyur seg ikki órógva av at Iran um stutta tíð kann senda stórar mongdir av olju út á heimsmarlnaðin.

Badri sigur at bæði aftaná OPEC-fundin í desember í 2014, og í juni í ár samdust limalondini um at halda framleiðsluni á 30 milliónum føtum av olju um dagin.

- Vit eru ikki til reiðar at minka um framleiðsluna, sigur Badri, ið júst hevur verið á vitjan í Russlandi, har hann hitti russiska orkumálaráðharran.

OPEC er felagskapurin fyri oljuframleiðandi lond. Limalondini eru hesi: Angola, Sameindu arabisku emiratini, Ekvador, Iran, Irak, Kuveit, Libya, Nigeria, Katar, Saudi-Arabia og Venesuela.